Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	25. februar 2021
Mál nr.:	21/00013
Málsviðgjørt:	JEK
Eftirkannað:	26. januar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)

(Skattlig javnseting av persónum, sum fáa fólkapensjón, og áseting um persónar, sum eru 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón, og sum áður hava fingið ein landsskattafrádrátt)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 163 frá 10. desember 2020 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti verður § 3 orðað soleiðis:

"**§ 3**

Broytingin í § 1, nr. 2 er ikki galdandi fyri persónar, sum eru 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón, og sum áður hava fingið ein landsskattafrádrátt eftir teimum reglum, sum vóru galdandi fyri persónar, sum vóru 67 ár ella eldri, fram til 31. desember 2020. Hesir persónar hava framhaldandi rætt til henda frádrátt undir somu treytum, sum vóru galdandi fram til 31. desember 2020."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í sambandi við fyrireikingina av løgtingsmáli nr. 45/2020 er, grundað á eina misskiljing, ein feilur komin inn í skiftisregluna (§ 3) í uppskotinum. Feilurin ber í sær:

at persónar, 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón og sum fram til 31. desember 2020 í staðin hava fingið ein landsskattafrádrátt frá 1. januar 2021 at rokna, missa henda frádrátt og

at hækkaði frádrátturin í landsskattinum og kommunuskattinum hjá persónum, sum fáa fólkapensjón, bert er galdandi fyri persónar, sum fylla 67 ár 1. januar 2021 ella seinni.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu fáa persónar, 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón, ikki tann landsskattafrádrátt, sum teir hava fingið fram til 31. desember 2020.

Heldur ikki fáa persónar, sum fyltu 67 ár áðrenn 1. januar 2021, lut í hækkaða landsskatta- og kommunuskattafrádráttinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at rætta ein eyðsýndan feil, sum er íkomin í sambandi við viðgerðina av løgtingsmáli nr. 45/2020.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður ásetingarlógin rættað.

Persónar, 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón og sum fram til 31. desember 2020 í staðin hava fingið ein landsskattafrádrátt, fáa framhaldandi henda frádrátt, og hækkaði frádrátturin í landsskattinum og kommunuskattinum hjá persónum, sum fáa fólkapensjón, verður galdandi fyri allar persónar, sum fáa fólkapensjón.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til formliga hoyring, men Fíggjarmálaráðið hevur ráðført seg við Almannamálaráðið og TAKS um uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, men tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at persónar, 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón, og sum áður hava fingið ein landsskattafrádrátt eftir teimum reglum, sum vóru galdandi fyri persónar, sum vóru 67 ár ella eldri, fram til 31. desember 2020, framhaldandi skulu hava rætt til henda frádrátt undir somu treytum, sum vóru galdandi fram til 31. desember 2020.

Tað hevur somuleiðis alla tíðina verið ætlanin, at allir persónar, sum fáa fólkapensjón, skattliga skulu verða javnsettir.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri persónar, sum av misgáum vórðu raktir av tí síðstu broytingini í ásetingarlógini.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot, sum rættar ein eyðsýndan feil, sum íkom síðstu ferð ásetingarlógin varð broytt.

Broytingin er skattliga til fyrimunar fyri borgarar, sum av misgáum hava verið fyri vanbýti.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í sambandi við fyrireikingina av løgtingsmáli nr. 45/2020 kom, grundað á eina misskiljing, ein feilur í skiftisregluna (§ 3) í uppskotinum.

Við hesum uppskotinum verður feilurin rættaður.

Rættingin ber í sær, at allir persónar, sum fáa fólkapensjón, skattliga verða javnsettir.

Harumframt ber rættingin í sær, at teir persónar í fólkapensjónsaldri, sum ikki fáa fólkapensjón, men sum áður hava fingið ein landsskattafrádrátt, sbrt. gomlu ásetingunum, framhaldandi fáa frádráttin, sum teir fingu til og við 31. desember 2020.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 25. februar 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur